

# Samkomublaðið fyri sept/okt 2016

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar








www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



# Ikki líka mikið

**Leif Høj**

Tað eru tíðir, har vit mugu steðga á, rannsaka og spyrja okkum sjálv: Harri, eri eg í tíni ætlan, behagar mítt lív teg, og er tað ein tráan eftir at fylgjast við Tær?

Vit eru kallað at brenna við Hansara dýrdleika sum Móses, Jóhannes, Paulus og fleiri túsundtals vitni gjøgnum tíðirnar. Men tað inniber, at vit mugu skilja okkum frá hesum heimi og frá teimum tráanum, sum hesin heimur hevur. Vit eru kallað at liva sum pílagrímar og fremmand í hesi verð. Okkara hægsta ynski eigur at vera at elska Harran og fylgja Hansara orði. Tá vil eldur Guðs brenna í tær!

Royna vit at liva í útkantinum av tilbiðjan og brúka lítla tíð saman við Harranum, ella vilja vit miðja eftir at vera so tætt við Harran sum til ber?

Eru vit eitt ættarlið, sum m.a. líkist Josva og Timoteusi! Um vit ynskja at fylgjast við Harranum og liva í reinleika, so kann Guð salva okkum, so heimurin ikki fær vald á okkum. Lat tað vera okkara tráan!

Tann besta tíðin liggur fyri framman. Guð hevur útvalt sær eitt fólk, sum vil lurta eftir Sær og vil liva heilagt fyri Guði. At synd er synd, at vit halda uppat at liva sum hesin heimur, men verða sædd sum livandi vitnir um Harrans góðsku, at vit eru frelst av náði, ikki við egnari kraft. Og at hesa kraft Guðs til frelsu kunnu øll koma at uppliva.

Kallað at vera boðberar ídag. Er tangin tómur nærum alla tíð, so hevur tú einki at geva.  Mong eru vorðin "disconnectað" við Harran. Møguliga av synd, ið er komin inn av ymsum slag. Ikki steingja Guð úti! Hann vil hjálpa tær, Hann ynskir, at tú vendir tær til Hansara líkamikið tína støðu. Guð er ikki óður við teg; ætlar tær ikki dóm og deyða. Men vil lyfta teg og vísa tær Sínar keldur og æviga ríki-dømi.

Orðið sigur:"Fær tí Sonurin gjørt tykkum fríar, verða tit av sonnum fríir." (Jóh. 8,36).

Trýrt tú hesum, er tíðin komin, at tú broytir kós, vendir við og fært samfelagið við Hann upprættað aftur ella at tú byrjar fyri fyrstu ferð. Tú kanst gera tað, har tú ert. Tað er ikki ov seint ella ómøguligt. Guð bíðar.

# Skrá fyri sept/okt

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 19. sept. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 20. sept. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 21. sept. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 22. sept. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 24. sept. | kl. 20.00: | AWAKE og konsert við Martin í Grund |
| Sunnudagur | 25. sept. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj. Breyðbróting |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 26. sept. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 27. sept. | kl. 10.00: | bønardagur |
| Mikudagur | 28. sept. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 1. okt. | kl. 20.00: | AWAKE við Ólavi Jacobsen |
| Sunnudagur | 2. okt. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Lissi Hansen<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 3. okt. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 4. okt. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 5. okt. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 6. okt. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 8. okt. | kl. 20.00: | AWAKE við Maibritt Frederiksberg |
| Sunnudagur | 9. okt. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ingibjørn Royðutoft |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 10. okt. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 11. okt. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 12. okt. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Fríggjadagur | 14. okt. | : | Sleepover í Kelduni (nærri kunning seinni) |
| Leygardagur | 15. okt. | kl. 19.30: | Vit syngja Aage Samuelsen sangir<br>(einki AWAKE) |
| Sunnudagur | 16. okt. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Jastrid og Paula Høj |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 17. okt. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 18. okt. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 19. okt. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 20. okt. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 22. okt. | kl. 20.00: | AWAKE-bønarmøti |
| Sunnudagur | 23 okt. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ragnhard Petersen |

# Lýsingar

**Vit syngja Aage Samuelsen sangir**
Leygarkvøldið 15 okt. kl. 19.30, verður eitt Aage Samuelsen kvøld í Kelduni.
Ymiskir bólkar og einstaklingar fara at syngja sangir hjá Aage Samuelsen, sála.
Aage skrivaði sera nógvar góðar og vakrar sangir, sum verða sungnir sera nógv í ymiskum kirkjum og samkomum.
Hetta kvøldið hava vit sett av til hansara sangir og koma bólkar og einstaklingar at framføra eitt úrval av sangum. Sjálvandi verður eisini felagssangur.
Millum tey, sum koma at luttaka, vera m.o.: Heine Lützen, Bill Justinussen, Oddbjørg Poulsen, Mirjam Carlsen, Bárður á Lakjuni, Terje Vestergaard, Eyðun Jacobsen, Oasubrøðurnir og Glæma Fleiri nøvn verða kunngjørd seinni.
So, set hetta kvøldið av og kom í Kelduna :-)

**At vaksa og leiða**
Ynskir tú at tæna Jesusi? Ynskir tú at gerast betri til at leiða onnur? Liggja menniskju tær á hjarta?
Stig eru nú tikin at skipa lærisveina- og leiðaraundirvísing í Kelduni. Leisturin er, at stutt innlegg verða hildin, og síðan er samrøða um innihaldið í upplegginum.
Kunnað verður nærri á Facebook og á morgunmøtunum um hetta tiltak.

**Hjúnabandslega**
Nú er aftur møguleiki at koma á hjúnabandslegu í Kelduni!
Vikuskiftið 11.-13. novembur vera Tina og Max í Føroyum og koma at hava leguna við okkum.
Legan er fyri øll hjún. Møguleiki verður at sova á kømurum, skúlastovum ella búgva heima. Kostnaðurin fyri kømurini er 1200,- fyri hvørt parið, fyri skúlastovu 1000,-, har eitt par er í hvørji stovu og 800,-, tá fólk sova heima.
Tilmeldingin fer fram á heimasíðuni www.keldan.fo, og tað er møguligt at melda seg til frá sunnudegnum 2. oktober kl. 18:00.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið
Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584